## KÍ tapti sísðta dystin

KÍ-kvinnurnar spældi í gjárkvøldið síðsta dystin í UEFA-kappingini, og mótstøðuliðið hesa ferð var finska meistaraliðið, FC Honka. Finska liðið legði fyri sum eitt óløgi og skoraðu tvey mál tíðliga í dystinum. KÍ kom tó eitt sindur fyri seg eftir hetta, og undan steðginum minkaði Malena Josephsen um munin til 2-1. Í seinna hálvleiki var tó aftur stórur munur á liðunum, og endaliga úrslitið gjørdist 4-1 til FC Honka. Við hesum endaði íslendska liðið, Valur, á fyrsta plássið við fullum stigatali. FC Honka bleiv numamr tvey við seks stigum, meðan KÍ og Den Haag fingu eitt stig í part.



## FCK tapti í Portugal

FCK spældi í gjárkvøldið fyrra dystin í 3. rundu av Champions League-kvalifikatiónini, tá teir vitjaðu í Lissabon hjá Benfica. Benfica var helst favorittur undan dystinum, og um miðjan fyrra hálvleik tóku teir eisini leiðsluna við máli, sum veteranurin, Rui Costa, skeyt úr 25 metrum. FCK fótaði sær tó eftir málið, og móti endanum av fyrra hálvleiki javnaðu teir við málið frá Atiba Hutchison. Henda støðan helt sær líka til triggjar minuttir fyri leiklok, tá Rui Costa aftur royndi seg úti frá. Enn einaferð endaði bólturin í málinum, og so vann Benfica fyrra dystin 2-1.

# Politiið kannar VB/Sumba venjaran

**Karen Marie Olesen, fúti, váttar, at løgreglan av sínum eintingum hevur tikið málið upp um venjaran hjá VB/Sumba, ið sló EB/Streym-leikara undir dysti herfyri**

FÓTBÓLTUR
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*



*Politiið kannar nú tilburðin í fótbóltsdystinum á Eiði næst seinasta sunnudag, tá VB-venjarin sló ein EB/Streyma-leikara í andlitið.*

Løgraglan hevur gjørt av at kanna málið, tá VB/Sumba venjarin sló EB/Streym-leikara undir dysti millum liðini suðuri í Vági herfyri.

Karen Marie Olesen sigur, at tað hendir av og á, at løgreglan tekur mál upp av sínum eintingum, og hetta er so eitt av dømunum.

Tann sannroynd, at hendingin varð sýnd í 3-2, og harvið varpað út um alt landið, er sum skilst orsøkin til, at løgreglan hevur valt at hyggja nærri at málinum. Fútin sigur, at løgreglan nú fer at seta seg í samband við allar viðkomandi partar í málinum.

Upp á fyrispurning, hvat ein møgulig revsing kundi verið sigur Karen Marie Olesen, at tað er ógjørligt at siga nakað um, men at tað í fall verður eftir paragraffunum í revsilógini, gingið verður eftir.

- Men tað er jú heldur ikki víst, at málið kemur so langt, leggur fútin aftrat.

Karen Marie Olesen sigur, at hendingin verður kannað, og at ein avgerð fellur í málinum innanfyri nærmastu framtíð, antin ákæra verður reist ella ikki.

Formaðurin í VB/Sumba, Bjarni Johansen, hevur onga viðmerking til málið, heilt einfalt tí at hann einki hevur hoyrt um, at hendingin verður kannað. Hann heldur tað samstundis vera løgið, at fútin lekur upplýsingar til miðlarnar, áðrenn viðkomandi partar hava frætt nakað í málinum.

Av skrivstovuni hjá FSF verður váttað, at sambandið seinasta mikudag sendi áheitan á Aganevndina um at taka málið upp til viðgerðar. Tað eydnaðist ikki blaðnum at fáa orðið á Anni á Hædd, sum er forkvinna í Aganevndini, men ein annar limur, Kjartan Mohr, sigur, at nevndin hevur fingið áheitanina, og at hann roknar við, at støða verður tikin fyrsta dagin til, um nevndin fer at viðgera málið ella ikki.

## FBF uttan nakra nevnd

**Á aðalfundinum hjá Flogbóltssambandinum leygardagin stóðu tveir av teimum trimum limunum í aðalnevndini fyri vali. Eingin stillaði tó upp, og tí verður neyðugt við eykaaðalfundi fyri at manna nevndina**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Á aðalfundinum hjá Flogbóltssambandinum leygardagin stóðu tveir av limunum í aðalnevndini fyri vali. Limirnir í aðalnevndini eru tríggir í tali, og tey, sum hava sitið síðsta skeiðið, eru Magnus Tausen úr Havn, sum er formaður, Kristianna Dam úr Kollafirði og Marjun Kalsø úr Klaksvík.

Undan ársaðalfundinum var tó greitt, at tveir av limunum stóðu fyri vali. Hvørki Kristianna Dam ella Marjun Kalsø ætlaðu at halda fram í nevndini, og tí skuldu tveir nýggir nevndarlimir finnast.

Hetta gekst tó ikki serliga væl á fundinum leygardagin. Eingin stillaði upp til valið, og tí heitti Flogbóltssambandi á feløgini um at finna fólk, sum kunnu manna aðalnevndini hjá Flogbóltssambandinum næsta skeið.

Eykaaðalfundur verður komandi vikuskiftið, har nýggir limir til aðalnevndina skulu finnast.

# Broyting í steypakappingini

**Á aðalfundinum hjá flogbóltssambandinum, sum var á skránni um vikuskiftið, bleiv samtykt at broyta steypakappingina nakað. Broytingin førir við sær, at bestu liðini í grundspælinum sleppa beinleiðis í steypafinaluna**

FLOGBÓLTUR
*Teitur Joensen*
*teitur@sosialurin.fo*

Um vikuskiftið var ársaðalfundurin hjá flogbóltssambandinum á skránni, og her vóru sjálvandi nógv mál ella viðurskifti til viðgerðar. Eitt av evnunum, sum bleiv viðgjørt var steypakappingin. Bæði ÍF og SÍ høvdu lagt uppskot fram at broyta bygnaðin av steypakappingini nakað, men sum uppskotini vóru til viðgerðar, valdi SÍ at taka sítt uppskot aftur, og so var bert uppskotið hjá ÍF eftir.

Undan komandi kappingarári hevur tað verið soleiðis, at vinnarin av Fleyrkappingini, sum er longu í Oktober mánaði, og vinnarin av Mjølnir-kappingini, sum er í januar, verða luttakararnir í steypafinaluni, sum plagar at vera mitt í februar.

Nýggja uppskotið hjá ÍF ber tó við sær, at vinnararnir av hesum báðum kappingum ikki sleppa beinleiðis í steypafinaluna. Í staðin skulu hesi bæði liðini spæla ein innanhýsis hálvfinaludyst, har vinnarin so verður annar luttakarin í finaluni.

### Landskapping kann tryggja pláss í steypafinalu

Stóru broytingin í samband við steypakappingina, sum bleiv samtykt á aðalfundinum leygardagin, er tó, at liðini í bestu deildunum kunnu tryggja sær pláss í steypafinaluni við góðum úrslitum tíðliga á árinum í landskappingini.

Hjá monnum er landskappingin ikki broytt nakað frá í fjør, og sostatt vera aftur fimm lið í bestu deildini, og liðini skulu spæla fýra ferðir ímóti hvørjum – tvær ferðir í grundspælinum og tvær ferðir í endaspælinum. Tað vil siga, at tað liðið, sum vinnur grundspælið, tryggjar sær beinleiðis atgongd til steypafinaluna.

Hjá kvinnum er tað eitt sindur øðrvísi. Nú vera sjey lið í meistaradeildini hjá kvinnum, eftir at tað bleiv samtykt á aðalfundinum, at Fleyr skuldi flyta upp í bestu deildina. Hetta førir við sær, at kvinnurnar spæla tríggjar ferðir ímóti hvørjum, og tað verður tað liðið, sum er fremst eftir seks umfør, sum fær annað plássið í steypafinaluni.

Nýggja uppskotið skal m.a. føra við sær, at liðini leggja størri dent á landskappingini, og við hesum uppskotinum skulu tey eisini helst spæla væl frá byrjan av fyri at tryggja sær eina plássið í steypafinaluni.